# TILTØK

**Aglow, Tórshavn**
Jólafundurin verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 11. des. kl. 19.30, Bodil og Malmberg Olsen luttaka, sangur við Magna Christiansen. Kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Havnar Kirkja**
**Heystkonfirmatiónirnar 2005**
Tey, sum skulu konfirmerast á heysti 2005, skulu møta í Havnar kirkju týsdagin 14. des. kl. 15.00. Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin 12. verða jólaveitslurnar fyri børnini. Børn til og við 1. flokk kl. 15.00. Frá 2. flokki og uppeftir kl. 17.00. Einki møti verður vegna jólaveitslurnar.

**Fríkirkjan Oasan**
*uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Edith og Jarnhold.
Sunnudagin kl. 16 Jólafest hjá Sunnudagsskúlanum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bienkowski, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti. Richard Schwartsson talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 19 verður tiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Adventshugni, øll vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í morgin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Tummas Jacobsen, evnið er »U-vending«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, missiónsmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Sam Jakobsen, evnið er: »Eitt praktiskt kristinlív í familjuni« 2. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin og breakthrough worship.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, har verður serstøk sangløta. Á tilbiðjanarmøtinum talar Jóhan Syderbø um »Hugleiðingar um Jesu føðing. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Øll eru vælkomin.
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 19 hevur heimaforbundið Jólahugna fyri øllum kvinnum.

**Frá Ebenezer**
Hósdagin kl. 10 Fyrraparts-løta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 17 Sangvenjing – eldra barnakórið, kl. 20 Ungdómsmøti og hugnaløta. Seinasta ungdómsmøti fyri jól. Talari: Jóan Magnus Rasmussen.
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, kl. 20 Ungdómsmøti, Jólaevangeliið.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14 Jóla- og barnagudstænasta í Havnar kirkju, Gentukórið luttekur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Dávid í Lág.
Sunnudagin kl. 17 Barna- og familjujólafest (nátturði aftaná – øll taka við). Vælkomin í Kelduna.

**Aglow, Eysturoy**
Jólamøti verður hósdagin 9. des. kl. 20 í Hæddini í Runavík við Bodil og Malmberg. Bæði kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð**
Hósdagin møta Tim5 og Liljur kl. 18.30.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti við Petur Zachariassen.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Glyvra Kirkja**
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsgudstænasta (ungdómskór syngur) Meinhard Bjartalíð.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Kongshavnar Kvinnufelag**
Jólahald fyri limir við gesti verður hóskv. 9. des. kl. 19.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Henry Christiansen.
Ungdómsmøti kl. 21 v/ Marius Jacobsen.
Mikukv. kl. 20 Bíbliutími.

**Soli Deo Gloria**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 15 Jólafest fyri børn.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Fríðtór Debes.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Jólahugni verður fyri sunnudagsskúlabørnum og foreldrum teirra í Missiónshúsinum í Porkeri sunnudagin 12. des. kl. 14.30. Øll eru vælkomin.

**Betania í Porkeri**
Møtir við Jógvan Zachariassen vera í Betania í Porkeri tórskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20. Evnið verður: Andaligur búnaskapur.

**Frelsunarherurin í Vági**
Hósdagin kl. 16.30 Barnakórið v/ Jens og Margrethu venur.

**Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, tann seinasti í ár, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Evangel. møti, Streingjakórið syngur, Eyðun Christiansen talar.**

**Evangel. fundur í DK**
Fríggjakvøldið 10. des. kl. 19.30 Evangel. fundur í Sædding Cnter, Sædding, Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19 Evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 12. des. kl. 17 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Á øllum hesum fundum syngur yngra Kvartettin úr Betesda, Klaksvík. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar borðreiða vit við kaffi og føroyskum viðskera. Børnini fáa pakka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 6. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
**10. des. verður jólaborð í Tilhaldinum. Tilmeld. tlf. 316491.**
*Týsdagin 7. november*
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Hugleiðingar úr farnu tíðum. Elin Mortensen
*Mikudagin 8. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Jóladøgurði
kl. 13.00-17.00 Opið hús
*Hósdagin 9. desember*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 15.00–17.00: **Jólasøla og tombola í kjallaranum**
*Fríggjadagin 10. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Jólaborð
kl. 14.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn**
Jólahugni verður fríggjadagin kl. 17.00.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 11. desember hava Apolonia og Richard í Hvannasundi gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Sunnudagin 19. desember hava hjúnini Sigrid og Absalon Jacobsen í Vági gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Stóra Pakkhúsið frá kl. 10-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.


J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50
T-postur: booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

HEIM TIL JÓLA?
SJÁLVANDI VIÐ NORRÖNU

Nú standa jólini aftur fyri durum, og tíð er at hugsa um at tryggja sær ferðaseðilin heim. Tilboðini frá okkum eru nærum ógjørlig at koma uttan um.

Ókeypis Buffet
Íroknað prísin er 1 x SCANDINAVIAN BUFFET á útferðini – stóra kalda borðið umborð.

| | |
|---|---|
| Fráferð Hanstholm: | 11.12 ella 18.12 |
| Fráferð Tórshavn: | 30.12 ella 06.01 |
| Fráferð Seyðisfjørður: | 15.12 ella 22.12 |
| Fráferð Tórshavn: | 27.12 ella 03.01 |
| Fráferð Lerwick: | 12.12 ella 19.12 |
| Fráferð Tórshavn: | 30.12 ella 06.01 |

PRÍSIR

| | |
|---|---|
| Lesandi | úr kr. 680,- |
| Eftirlønt | úr kr. 315,- |
| Lesandi | úr kr. 870,- |
| Eftirlønt | úr kr. 390,- |
| Lesandi | úr kr. 475,- |
| Eftirlønt | úr kr. 215,- |

Prísurin fatar um ferð annan vegin, íroknað 1 x Scandinavian Buffet á útferðini. Øll kømur hava wc/bað.

FERÐIST 2 GJALDIÐ FYRI 1
2 VAKSIN VIÐ BILI FRAM OG AFTUR

Á túrinum 18. des. spæla SØLVA OG BERGMENN

ÚR DANMARK BERT 3.270,-
ÚR ÍSLANDI BERT 2.640,-
ÚR HETLANDI BERT 1.680,-

Íroknað er: Sigling fram og aftur í 2-koyggjukamari, innan, íroknað 1 x Scandinavian Buffet á útferðini.
Øll kømur hava wc/bað.

SMYRIL LINE